Skúlastýrisfundur 02.11.2021

Møtt vóru

Durita Poulsen, Rakul Borg Brattaberg, Birgir Jørgensen, Marin Gaardlykke, Jónleyg Eyðunsson, Hjørdis Simonsen og John Henrik Holm

Skrá

1. Síðan seinast
2. Fráverupolitikkur skúlans
3. Hølisviðurskifti - gamli svimjihylurin
4. Skúlagarðurin
5. Foreldrafundur
6. Ymiskt

Ad. 1 Tosað var um ymiskt og kunnað var sjálvandi um korona støðuna í skúlanum. Skúlin er higartil ikki raktur av korona

**Ad. 2**

# Mannagongd fyri næmingafráverur

## www.kervi.fo/m3 (1.-3. fl.)

- Fráveran verður førd á www.kervi.fo/m3. Fráveran verður vanliga førd 1. tíma.
- Flokslærarin hevur ábyrgdina av fráveru skrásetingini
- Frávera verður býtt í fýra: við loyvi, uttan loyvi, ov seinur/min og sjúka
- Flokslærarin skal hava fráboðan, tá ið næmingur ikki er í skúla. Fráboðanin kann koma áðrenn ella beint eftir fráveruna.
- Fær flokslærarin onga fráboðan um fráveru, setur hann seg í samband við heimið
- Eru áhaldandi trupulleikar við at fáa fráboðan um fráveru, vendir flokslærarin sær til leiðsluna. Saman við flokslæraranum tekur leiðslan sær av málinum
- Skrivstova skúlans setur upp mánaðaryvirlit fyri fráveru í flokkunum hvønn mánað

## www.kervi.fo/m3 - Tímabók (4.-10. fl.)

- Lærarar í miðdeildin  og framhaldsdeildini skulu føra fráveru hvønn tíma
- Flokslærarin hevur høvuðsábyrgdina av fráveru skrásetingini
- Frávera verður býtt í fýra: við loyvi, uttan loyvi, ov seinur/min og sjúka
- Flokslærarin skal hava fráboðan, tá ið næmingur ikki er í skúla. Fráboðanin kann koma áðrenn ella beint eftir fráveruna.
- Um næmingur hevur ov stóra fráveru, tosar viðkomandi lærari við næmingin og kunnar flokslæraran. Við ov stóra fráveru verður hugsað um, at næmingar eru nógv burtur stutt tíðarskeið (t.d. 2-3. vikur) ella javnan eru burtur einstakar tímar yvir eitt longri tíðarskeið.
- Um fráveran heldur fram, tosar flokslærarin saman við læraranum við heimið um støðuna. Samrøðan skal skjalprógvast við skjali, sum verður latið skrivstovuni.

- Heldur fráveran hjá viðkomandi næmingi fram, skal lærarin aftur siga flokslæraranum frá, og flokslærarin/lærarin kunnar heimið um støðuna. Samrøðan skal skjalprógvast við skjali, sum verður latið skrivstovuni.
- Heldur fráveran hjá viðkomandi næmingi fram, skal lærarin aftur siga flokslæraranum frá. Flokslærarin vendir sær til leiðsluna við málinum, og saman við flokslæraranum tekur leiðslan sær av málinum
- Skrivstova skúlans setur upp mánaðaryvirlit fyri fráveru í flokkunum hvønn mánað

Ad. 3 Skúlin fer komandi árini at hava fleiri árgangir, sum koma at vera deildir í tveir flokkar. Vantandi verða núverandi 2. – 5. flokkur tvísporaðir, tá børnini í Sumba og Porkeri koma til Vágs í 8. flokki. Vit hava í dag ein 2. flokk, sum longu er tvísporaður. Hetta setur økt krøv til flokshølir, serliga í framhaldsdeildini.

Aulan er alt ov lítil at savna allan skúlan í. Tískil hava vit einki felagshølið í dag, har allir skúlin kann samlast. Gongd er í málinum at umbyggja gamla svimjihylin til nýggja felagshølið skúlans. Marin kunnaði um at kommunan hevði havt ymiskar loysnir á borðinum, og nú var semja um at fara undir arbeiði. Arbeiðið verður gjørt sum ráðini eru.

Ad. 4 Skúlagarðurin: tjakast verður um ymiskar ábøtur, sum eiga at verða gjørdar í skúlagarðinum. John Henrik hevur tosað við Hans Paula (húsavørðin). Hann hevur saman við teknisku deild hjá kommununi biðið um tilboð at fáa stoypt túnið í skúlagarðinum. Tjakast var um ymiskar ábøtur, sum kundu verða gjørdar í skúlagarðinum.

Ad. 5 Ætlanin var at biðja Eyðbritt Hjelm um at halda ein fyrilestur um orðblindni og hvussu hon hóast orðblind gongur á froðskaparsetrinum í Roskilde. Men tað lá ikki fyri, áðrenn hon fór av landinum aftur. Nú Korona aftur herjar í landinum verður avgjørt at útseta felags foreldrafundin til í vár.

Ad. 6 John Henrik kunnaði um at árliga gjaldið til Nám ikki var tikið við í fíggjarætlan skúlans fyri hetta skúlaárið. Hetta vil viðføra at raksturin hjá skúlanum verður merktur um ikki skúlin fær eina eykajáttan. Skúlin hevur tó pening á løguætlan skúlans til gjaldið til Nám. Tí mælir John Henrik til at flyta restjáttanina á íløgusíðu skúlans til raksturin, so er ikki neyðugt við einari umbøn um eykajáttan. Hetta tekur skúlastýrið undir við.

Annars verður kunna um at næmingatalið farnu árini hevur verið vaksandi. Sí niðanfyri standandi:

| 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 196 | 202 | 211 | 214 | 216 | 220 | 230 |

Hetta viðførir sjálvandi samsvarandi øktar útreiðslur til raksturin av skúlanum. Hetta hevur kommunan, smb. fíggjarleiðarinum, tikið við í metingini til komandi fíggjarlóg.

Durita Poulsen

Birgir Jørgensen

Jónleyg Eyðunsson

Rakul Borg Brattaberg

Marin Gaardlykke

Hjørdis Ryggshamar